## 4.000 vilja hoyra Bryan Adams

Five Star Entertainment, sum stendur fyri konsertini við Bryan Adams í summar, sigur í tíðindaskrivi, at tey higar til hava selt fleiri enn 4.000 atgongumerki. Higartil eru atgongumerkir seld á netsøluni hjá Eik og í Kunningarstovuni í Havn, men nú seinastu atgongumerkini verða sett til sølu, ber eisini til at keypa hesi á Kunningarstovunum í Vági, Runavík og Klaksvík.



## Drápsmaður krevur endurgjald

Ein spanskur bilførari, sum í summar koyrdi á og drap ein ungan mann á súkklu, hevur nú kravt familjuna hjá tí deyða eftir 150.000 krónum. Peningurin skal gjalda teir skaðar, sum luksusbilur hansara fekk, tá ungdi kroppurin og súkklan raktu bilin. Tað skrivar Reuters. Afturat teimum 150.000 krónunum fyri skaðan á bilin, krevur maðurin eisini 30.000 krónur, sum var kostnaðurin fyri at vera noyddur at leiga ein bil, meðan hansara egni var á vekstaði. Familjan hjá offrinum øtast - sum vera man- um kravið.

# Løgmaður trýstur upp í ein krók

**- Miseydnast hendan royndin hjá Jóannesi Eidesgaard at skipa samgongu, noyðist hann helst at geva skarvin yvir og lata Høgna Hoydal ella onkran annan taka yvir, heldur politiski viðmerkjarin hjá Sosialinum og Rás2**

SAMGONGUS-AMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Miseydnast hendan royndin hjá Jóannes Eidesgaard at skipa samgongu ímillum Javnaðarflokkin, Miðflokkin og Tjóðveldisflokkin, noyðist hann helst at leggja kongin.

Tað heldur Jógvan Mørkøre, politiskur viðmerkjari hjá Sosialinum og Rás2.

Hann heldur sostatt, at royndin at skipa eina CHE samgongu, helst er seinasti møguleikin hjá Eidesgaard at skipa samgongu á hesum sinni.

Miseydnast hendan royndin, vænti eg, at hann verður noyddur at geva skarvin yvir og at lata Høgna Hoydal ella onkran annan royna at skipa samgongu ístaðin.

### Tungt at venda aftur

Í alla farnu viku royndi Jóannes Eidesgaard at endurstovna ABC samgonguna, men brádliga fríggjadagin krøkti hann bæði A og B av í senn.

Jógvan Mørkøre heldur, at tað er ein spurningur um tað ikki var eitt mistak av Jóannesi Eidesgaard at geva bæði Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum durafjórðingin í senn.

Miseydnast hendan royndin at skipa eina CHE samgongu, er ógvuliga ilt at hugsa sær, at Løgmaður hevur aðrar møguleikar.

- At fara aftur til antin Sambandsflokkin ella Fólkaflokkin, fer mest at líkjast eini biddaraferð og tað verða uttan iva so tung spor hjá løgmanni at ganga, at tað er ein spurningur um hann yvirhøvur fer at seta seg í eina slíka støðu, tí tað er ikki tað besta útgangsstøðið í eini samráðing.

Jógvan Mørkøre dylir sostatt ikki fyri, at tað kom rættiliga óvart á hann, at løgmaður krøkti bæði Sambandsflokkin og Fólkaflokkin av ísenn, tí tað fer uttan iva at avmarka hansara møguleikar rættiliga nógv, skuldi tað miseydnast at skipa eina CHE samgongu.

Hann hevði heldur sæð fyri sær, at løgmaður fór at tveita annan flokkin á dyr og at royna víðari samráðingar við hinum flokkinum og so Tjóðveldinum afturat.

Tað var altíð vandi fyri, at Fólkaflokkurin fór at leggja so hart út á sjálvstýrisleið og at fáa blokkin skerdan, at Sambandsflokkurin ikki kundi vera við.

Hinvegin var eisini vandi fyri, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fóru at leggja so hart út á fiskivinnuøkinum og kanska á øðrum økjum við, at Fólkaflokkurin fór í baklás.

- Sostatt hevði tað ikki verið óvæntað, vissi tað ikki hevði eydnast at samansjóða sjónarmiðini hjá fyrst og fremst Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

Tí hevði tað heldur ikki komið óvart á Jógvan Mørkøre, vissi samráðingarnar um ABC samgonguna í farnu viku, endaðu við, at Løgmaður og Javnaðarflokkurin slepti øðrum av hinum báðum flokkinum og helt fram við hinum.

- Hann kundi slept Fólkaflokkinum fyri at samstarva víðari við Sambandsflokkin og Tjóðveldið um vinnumálini, og serliga fiskidagaskipanina, ella hann kundi slept Sambandsflokkinum og arbeitt víðari við eini sjálvstýrismálum øðrum málum, sum hann kundi samst við Fólkaflokkin Tjóðveldið um.

Jógvan Mørkøre metir, at í báðum førum hevði Tjóðveldi verið eitt gott boð, tí við Tjóðveldinum hevði bæði borið til at tikið stig á sjálvstýrisleið, men tað hevði eisini borið til at funnið semjur um fiskivinnumálini.

- Tí haldi eg, at tað var heilt óvæntaða, at báðir flokkarnir fingu sekkin í senn, sigur Jógvan Mørkøre. Men hann sigur tað við tí fyrivarni, at hann ikki veit, hvat er farið fram handan leiktjøldini.

Samstundis halda allir partar kortini tætt inn at kroppinum, so tað kann vera torført at meta um støðuna.

Tí kunnu tað sjálvandi vera viðurskifti, sum vit ikki vita nakað um, sum gera valið hjá løgmanni logiskt.

Men samgongumøguleikarnir eru nógvir og tað hongur altíð sum ein hóttan yvir samráðingunum, tí kemur stígur í onkustaðni, liggur altíð onkur annar klárur.

Orsøkin til at Løgmaður nú er farin eftir Fólkaflokkinum og Miðflokkinum kann vera, at hann annars stúrir fyri, at alt hetta politiska spælið kann enda við eini fullveldissamgongu.

Hinvegin hevur tað verið eitt ávíst fríggjarí ímillum Sambandi og Tjóðveldið og tað kundi verið ein ávísur logikkur hjá Javnaðarflokkinum í at roynt eina samgongu ímillum teir báðar flokkarnar.

### Høgni ella onkur annar

Skuldi hendan royndin at skipa CHE samgongu, miseydnast, er spurningurin, hvat so hendir.

- So verður tað ein spurningur, hvørjir hinir flokkarnir vísa á sum næsta samráðingarleiðara og tað kann verða tórført at meta um.

Spurningurin er so kanska meiri, hvønn teir smáu flokkarnir fara at vísa á.



*Miseydnast hendan royndin hjá løgmanni, noyðist hann helst at leggja kongin*

- Teir plagdu ikki vera so altráðir eftir at vísa á Tjóðveldið, men í hesum førum kann tað vera, at Miðflokkurin er sinnaður fyri eini sjálvstýrissamgongu og sostatt fer at vísa á Høgna Hoydal.

Men tað er eisini greitt, at tann, sum so fær samráðingarrættin, fær samstundis ein fyrimun í telvingini um at løgmansessin og har plaga teir stóru flokkarnir at vísa á teirra egna formann.

- Tí kann tað einsvæl gerast ein spurningur um persónar sum um flokkar og har kann tað vera ein spurningur um, hvat teir ymsu flokkarnir vilja góðtaka.

Veljarakanningarnar hava víst, at Høgni Hoydal hevur havt vaksandi undirtøku fyri at gerast løgmaður, samstundis sum bæði sambandsformaðurin, Kaj Leo Johannesen og fólkafloksformaðurin, Jørgen Niclasen, havi staðið nógv veikari.

- Tað kann verða tann stóri møguleikin hjá Tjóðveldinum at fáa løgmann fyri fyrstu ferð í søguni, heldur Jógvan Mørkøre.

# Nógvar leysar kanónir á dekkinum

**Ein samgonga millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin hevur so nógvar leysar kanónir á dekkinum, at eg dugi illa at síggja, at hon kann halda serliga leingi, heldur politiski viðmerkjarin hjá Sosialinum og Rás2**

SAMGONGUS-AMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg dugi illa at ímynda mær, at ein samgonga ímillum Javnaðarflokkin, Miðflokkin og Tjóðveldið kann halda serliga leingi

Tað heldur Jógvan Mørkøre, politiskur viðmerkjari hjá Sosialinum og Rás2.

Hann vísir á, at ein CHE samgonga hevur bara 17 tinglimir í rygginum og tað merkir, at bara ein leypir frá í onkrum máli, er meirilutin fokin.

- Og hesi seinastu valskeiðini hava víst, at báðir teir stóru flokkarnir hava leysar kanónir á dekkinum, sum tað ongin trygd er fyri, at floksformenninir klára at stýra í avgerðandi løtum.

Løgmaður hevur hinvegin víst á, at ein 17 mannasamgonga hevur tað styrki, at tað fer at krevja disiplin av hvørjum einstøkum tinglimi og at tað er ein styrkur

- Men fráboðanin seinastu dagarnar frá Gerhardi Lognberg, sum setti ófrávíkilig krøv til Sandoyartunnilin, áðrenn samráðingarnar byrjaðu og frá Heina O. Heinesen um vinnuligan fiskiskap, benda á, at tað er ongin trygd fyri disiplinini. Tí er hetta eitt sindur vágaligt og kanska enntá eitt sindur bláoygd.

Tí hevði Jógvan Mørkøre sæð fyri sær, at Sjálvstýrisflokkurin kom við í samgonguna sum ein buffari, men tað hevur Løgmaður ikki áhuga í.

Og tað undrar hann og tað undrar hann serliga, at Skálafjarðartunnilin skal viga so tungt, tí tað er ikki eitt mál, sum hevur verið umrøtt í valstríðnum.

Og nettupp spurningurin um Skálafjarðartunnilin kann vera eitt mál, sum fær onkra av teimum leysu kanónunum ganga av. Serliga kann tað vera torført hjá tinglimum við tilknýti til Eysturoy at góðtaka, at pilka verður við ta ætlanina nú og so hevur samgongan longu mist meirilutan.

Tað, sum er frammi nú um Skálafjarðartunnilin, er at nú skal tað vera eitt alment partafelag, sum skal fer hann, so at avkastið kann brúkast til at fíggja aðrar verkætlanir við.

- Løgmaður hevur havt góðar royndir av at hava nakrar tinglimir í meiriluta, so at samgongan hevur eitt fríholt og tí haldi eg at tað er eitt sindur vágaligt at seta álitið á eina samgongu, sum er treytað av, at øll ganga í takt í øllum málum, heldur Jógvan Mørkøre.